## Færri løntakarar

Í oktober 2008 var talið av løntakarum 140 fólkum færri enn somu tíð árið fyri, ella ein afturgongd á 0,5 prosent. Í fiskivinnuni er afturgongdin heili 10 prosent. Hetta er triði mánaðurin á rað, at talið á løntakarum er eitt vet lægri enn sama tíðarskeið í 2007. Í oktober 2007 vóru 4.751 løntakarar í fiskivinnuni. Eitt ár seinni vóru 489 færri løntakarar í fiskivinnuni, ella ein afturgongd omanfyri 10 prosent. Í 1995 var talið av løntakarum innan tað almenna 5.946, ella ein triðingur av løntakarunum. Síðan hevur ein javnur vøkstur verið í hesum bólki, soleiðis at talið í oktober 2008 var 9.155 ella 35,7 prosent av øllum løntakarunum, sigur Hagstova Føroya.



## Bogi formaður

Byggi- og býarskipanarnevndin í Tórshavnar býráð hevur skipað seg við Boga Andreasen úr Tjóðveldi sum formanni og Elini Lindenskov úr Javnaðarflokkinum sum næstformanni. Hinir nevndarlimirnir í byggi- og býarskipanarnevndini í Tórshavnar býráð hetta skeiðið eru Levi Mørk úr Javnaðarflokkinum, Jógvan Arge úr Tjóðveldi og Jan Christiansen úr Fólkaflokkinum.

# Føroyskt bíbliukjak vísast á Iktus

**Í gjárkvøldi skipaði Meinigheitshúsið fyri spennandi kjaki um bíbliuna í Miðlahúsinum. Stúgvandi fult av fólki var møtt, og fleiri máttu venda í hurðini, tí fult var. Men teimum eru góð tíðindi at bera, tí kjakið verður nevnliga sent á Iktus í nærmastu framtíð**

RELIGIÓN

*Samrøður og myndir: Jan Müller*
*Skrivað: Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Høvuðsaktørarnir, Theodor E. D. Olsen, prestur og orðstýrari, Bergur Debes Joensen, prestur, og Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingur og høvundur av bókini »Bíblian - Guðs Orð ella orð um Guð«*



*Fólkasangarin Hanus G. Johansen, ið eisini hevur sungið nógv um trúgv, hevði leitað sær oman at lurta eftir kjakinum. Fyri hansara viðkomandi var tað serliga Hans Andrias Sølvará, ið dróg*






Annahvørt mánakvøld plagar Meinigheitshúsið skipa fyri møti fyri ung yvir 18 ár, har tey taka ymisk evni upp. Soleiðs var eisini í gjárkvøldi, tá Bergur Debes Joensen og Hans Andrias Sølvará skuldu samskifta um bíbliuna.

Upprunaliga var hetta eitt slíkt tiltak, men fyrireikararnir mettu at tiltakið var somikið spennannadi, at tað gangnaði tiltakinum at flyta tað í eitt meira neutralt hús, og tí valdu fyrireikararnir at flyta tað oman í Miðlahúsið í Vágsbotni.

Henda metingin vísti seg eisini at vera røtt, tí stúgvandi fult av fólki varð møtt í Miðlahúsinum til kjakið, har Bergur Debes Joensen og Hans Andrias Sølvará skuldu kjakast um bíbliuna.

Bergur Debes Joensen er prestur, og hevur av og á verið frammi, sum ein ið trýr at Bíblian er Guðs orð - galdandi til allar tíðir. Hans Andrias Sølvará er hinvegin søgufrøðingur, og er eitt nú høvundur til bókina »Bíblian - Guðs Orð ella orð um Guð«. Theodor E. D. Olsen, prestur, var orðstýrari.

Religión er eitt evni, sum næstan allir føroyingar hava eina rættiliga sterka meining um, og tí var áhugin serliga stórur um júst hetta kjakið.

### Vísast á Iktus

Ein av teimum, ið høvdu hoyrt um og víst áhuga fyri kjakinum um bíbliuna var Petur Jacobsen, ið stendur fyri nýggju kristiligu sjónvarpsrásini Iktus. Í gjárkvøldi lupu teir frá Iktus avstað, tá teir vóru mintir um tiltakið, til tess at fáa tað tikið upp. Á vegnum til Miðlahúsið ringdu teir til fyrireikararnar fyri at fáa fatur á neyðugu loyvunum, og tá tað eydnaðist, var klárt at taka upp.



*Petur Jacobsen, eigari av Iktus, fegnaðist um upptøkurnar, ið vóru gjørdar, og gleðir seg til tær kunnu vísast á kristiligu sjónvarpsrásini Iktus*

Eftir kjakfundin var Petur Jacobsen væl nøgdur við upptøkurnar.

-Tað riggaði óalmindeliga væl at taka upp. Her eru fínar kulissur og eitt fínt rúm, og tað sum er so gott er, at øll sita so nær, og tað blívur so øgiliga viðkomandi. Hetta er eitt sera spennandi og viðkomandi evni, tí øll hava eina meining um trúgv og bíbliuna, greiðir Petur Jacobsen frá.

Nær upptøkurnar verða vístar á Iktus, visti hann tó ikki at siga, tí hugskotið um at taka upp kom so knappliga.

### Ein røtt avgerð

Um avgerðina hjá fyrireikarunum at flyta tiltakið oman í Miðlahúsið hildu tey flestu, at tað var ein røtt avgerð at taka.

- Tú fært slett ikki tað sama klientellið, sum í einum meinigheitshúsi. Tað eru nógv fólk, sum ikki fara inn í eitt meinigheitshús per prinsipp, segði Petur Jacobsen.

Eisini Tummas Juul Askham helt tað vera eina rætta avgerð at taka.

- Tað vísir seg soleiðs, at tey neutralu hølini samla mest. Tá man kemur inn á tey etableraðu hølini, so sum samkomur og kirkjur, tá virkar tað sum at gáttin er ov høg. Men hetta var væntandi, at tað bleiv so nógv. Her eru nógv fólk, og rættiliga nógvur ungdómur. Hetta var eitt ótrúliga áhugavert kvøld, greiddi Tummas Juul Askham frá.